# Konsertir við Elisabeth Westenholz, klaver og Kim Bak Dinitzen, sello



**Í tíðarskeiðinum 15. – 22. oktober skipar Konsertfelagið fyri konsertum við tónleikarunum Kim Bach Dinitzen og Elisabeth Westenholz**

TÍÐINDASKRIV

Tey bæði spæla sello og klaver og tey fara at hava konsertir ymsa staðni í Føroyum. Skráin eru verk av tónaskaldinum Ludwig van Beethoven, sum livdi í árunum 1770 – 1827. Beethoven hevur skrivað fleiri verk fyri sello og klaver. Best kendar eru tær fimm sellosonaturnar, sum verða høvuðsverkini í konsertskránni hjá hesum tónleikarum á konsertferð teirra í Føroyum.

Kim Bach Dinitzen (f. 1963) hevur útbúgving fra Kgl. Musikkonservatoriinum í Keypmannahavn har lærari hansara var Erling Bløndahl Bengtson. Han debuteraði í 1986, og hevur síðan tá verið solistur við næstan øllum donskum orkestrum og hevur fingið fleiri virðislønir. Millum annað Jacob Gades Legat og Victor Borge Prisen.

Í 1988 vann Kim 1. virðisløn í tveimum amerikanskum tónleikakappingum. Aftaná tað spældi hann konsertir bæði í Washington D.C. og í New York's Carnegie Hall. Síðan hevur hann eisini vunnið virðislønir í øðrum internationalum kappingum og hevur spælt í Onglandi, Japan, Italien og restina av Europa.

Kim hevur eisini spælt inn á fløgu. Øll selloverkini av Benjamin Britten og Fauré og sonatur av Strauss og Brahms. Í 1998 spældi hann inn cellokonsertina hjá Emil Hartmann saman við Sønderjyllands Symfoniorkester.

Aftaná 14 ár í Stórabretlandi fekk Kim 2003 starv sum solosellistur í Kgl. Kapelinum í Keypmannahavn. Hann undirvísir framvegis í Manchester og spælir í Chamber Orchestra of Europe.

Elisabeth Westenholz (f. 1942) er væl kend í Føroyum við tað, at hon fleiri ferðir hevur verið her og spælt konsertir. Elisabeth er útbúgvin bæði sum urguleikari og pianistur, men tað er sum klaverleikari hon hevur gjørt tey størstu avrikini. Bæði sum solistur og sum kamartónleikari hevur hon útynt tað heilt óvanliga. Við hennara spæli gevur hon ikki bert teknisk eina fulkomna framførslu, men eisini eina djúpfølda tulking av tí tónleiki, hon framførir.

Elisabeth hevur spælt nógvar konsertir bæði í Danmark og øðrum londum. Sjálvt um hon hevur verið eftirspurd sum sololeikari, so hevur tað víst seg, at tað er innan kamartónleik hon hevur havt størsta virkið. Síðan 1995 hevur hon spælt saman við ungu tónleikarunum violinspælaranum Nikolaj Madojan úr Armenia og sellospælaranum, sum hon spælir saman við á hesi føroyaferð, Kim Bak Dinitzen.

Elisabeth hevur spælt millum annað allar klaverkonsertirnar hjá Beethoven inn á fløgu, fleiri av Mozartsa klaverkonsertum, klaver- og orgulverk hjá Carl Nielsen og kamartónleik av Haydn, Kuhlau, Brahms og øðrum.

Á føroyaferðini fara tey bæði at spæla verk fyri cello og klaver av Beethoven.

Konsertir verða í Havn, Trongisvági, Vági, Klaksvík og Runavík. Skúlakonsertir verða í Hvalba og á Giljanesi.

Atgongumerkir á 100 kr. fáast við dyrnar. Børn og skúlaungdómur ókeypis atgongd.

**Tíðarætlan:**

*Hósdagin 15. oktobur kl. 19.30*
konsert í Løkshøll, Runavík
*Fríggjadagin 16. oktobur*
konsert í Christianskirkjuni, Klaksvík
*Sunnudagin 18. oktobur kl. 16*
konsert í Norðurlandahúsinum, Tórshavn
*Týsdagin 20. oktobur kl. 16*
konsert í Framtíðini, Vági
*Týsdagin 20. oktobur kl. 19.3*
konsert í Trongisvágs skúla
*Mikudagin 21. oktobur kl. 9*
skúlakonsert Hvalbiar skúla
*Hósdagin 22. oktobur kl. 10*
skúlakonsert Giljanesi, Vágum

ADVOKATSKRIVSTOVAN

GOMUL HÚS Í KVÍVÍK

Um hóskandi boð fæst, verður sethúsaognin, matr. nr. 41 a, Kvívík, Víkarvegur 28, seld. Talan er um eini gomul sethús við kjallara, stovu- og loftshædd.

**Kjallari:** óinnrættaður.

**Stovuhædd:** gangur, stova, stórur køkur, baðirúm og trappa upp á loftið.

**Loftshædd:** gangur og 4 kømur.

Kjallarin er umleið 64 $m^2$, stovuhæddin umleið 84 $m^2$ og loftshæddin 48 $m^2$. Tilbygningur er bygdur uppí húsini. Í niðaru hæddini eru garaga og amboðsrúm, uml. 35 $m^2$ og í ovaru hæddini goymslurúm og hoyggjhús.

Innan eru húsini í hampuligum standi. Tak og klædningur skulu skiftast.

Stykkið er í tveimum lutum, sum sambært Matrikulstovuni er umleið 195 $m^2$ og 12 $m^2$.

Áhugað kunnu venda sær til Advokatskrivstovuna, Frúutrøð 4, Tórshavn, Fríða Patursson, adv. frp@jura.fo ella skrivaran Anniku Reginsdóttir Olsen, aro@jura.fo

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6
FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36
WWW.JURA.FO

# Sahbai: Stórt hjálpartiltak við asiatiskum marknaði á torginum í SMS

TÍÐINDASKRIV



Torgið í SMS verður karmur um stórt hjálpartiltak fríggjadagin og leygardagin til frama fyri gentur og kvinnur, sum eru komnar illa fyri á skøkjumarknaðunum í Kambodja og Thailandi.

Fríggjadagin 16. og leygardagin 17. oktober verður skipað fyri asiatiskum marknaði á Torginum í SMS, har møguleiki verður at keypa turrikløð, taskur, buksur, kryddurtir og mangt annað, sum er framleitt í Kambodja.

Allur vinningurin fer til at stuðla felagsskapum í Kambodja og Thailandi, sum hjálpa gentum og kvinnum at koma burtur úr skøkjulívi.

Umframt møguleikan at keypa sær okkurt forkunnugt plagg ella tinganest úr fjareystri, og harvið stuðla hjálpararbeiði millum kvinnur í Kambodja og Tailandi, verður møguleiki at hoyra tónar við Eyðgunn og Jákupetur (Eyðun Johannessen, Gunnar Justinussen, Petur Háberg Jacobsen og Jákup Zachariassen). Somuleiðis seta Petur Háberg og Sølvu Ford eisini sín dám á, tí tey framføra.

Ein alsamt vaksandi trupulleiki í Asia er sexídnaðurin, eisini nevndur nýmótans trælahandilin. Orsøkin at genturnar enda í hesu syrgiligu støðu eru ymiskar.

Genturnar, ið arbeiða sum skøkjur, koma ofta frá fátøkum bygdum, og nógvar av teimum hava lítla skúlagongd. Nógvar giftast sum 11 ára gamlar og fleiri eiga børn. Ofta rýma mennirnir frá teimum og fáa sær aðrar konur ella rýma til rúsevni. Tær fáa bjóðað gott arbeiði í býnum. Arbeiðsgevarin lovar at gjalda fyri flutning og uppihald ta fyrstu tíðina. Ofta fær gentan at vita, at hon skal arbeiða sum tænari. Fyrstu dagarnar arbeiðir honum sum tænari, men eftir stutta tíð verður hon noydd til at arbeiða sum skøkja. Fyri hesar gentur er hetta einasti møguleiki tær hava at vinna sær til lívsins uppihald.

Aðrar eru seldar heilt ungar, summar einans 5 ár, tí familjan ikki hevur ráð at breyðføða tær. Hvønn dag verða ungar gentur seldar sum sex-trælir.

Í eitt ár arbeiddu Noomi S. og Eli J. Christiansen við ymiskum hjálpararbeiði í Kambodja. Meðan tey vóru í Kambodja kom Noomi í samband við ein felagsskap, sum ger hjálpararbeiði millum gentur á skøkjumarknaðinum. Hjálparfelagsskapurin White Dove, sum Noomi kom í samband við, hevur eitt heim fyri gentur, sum hava arbeitt á skøkjumarknaðinum. Umframt tak yvir høvdið og mat og klæðir, fáa tær frálæru í enskum, khmer, reinføri, heilsu og smittandi sjúkum. Tær læra handligt arbeiði, fyri at tær kunnu framleiða vørur, so tær kunnu vinna sær nakað av peningi.

Í Thailandi eru fleiri heim fyri hesar gentur, eitt av hesum heimum nevnist NightLight. Genturnar, ið búgva á NightLight-heiminum, fáa bjóða útbúgving, undirvísing, arbeiði og eitt trygt heim. Tær gera ótrúliga flottar smykkur, sum m.a. Logos bókasøla í Havn selur fyri tær.

Noomi og Eli fingið hugskotið at gera eitt átak, tá tey komu aftur til Føroyar, við tí endamáli at hjálpa hesum felagsskapum – White Doves í Siem Reap og Night Light í Bangkok. Fyriskiparnir vóna, at fólk taka væl undir við tiltakinum. Meiri peningur kemur inn, fleiri gentur kunnu hjálpast burturúr skøkjulívinum.

Hjálpartiltakið við asiatiska marknaðinum byrjar kl. 10 fríggjamorgunin og heldur fram til leygardagin kl. 16.